Álit

í

løgtingsmáli nr. 65/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali (Hækka upphæddina, sum landsstýrismanninum verður heimilað at brúka)

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð 9. mars 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 15. mars 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Landsverki og Miðnámi á Kambsdali.

Triðja byggistig er seinasti liðurin í heildarætlanini frá 2012 um út- og umbygging í sambandi við samanlegging av miðnámsskúlunum á Kambsdali. Sambært høvuðsprosjektinum fevnir hesin parturin av verkætlanini m.a. um at nýbyggja náttúruvísindadaliga økið, útbyggja felagsøkið, køkin og undirvísingarhølir, at gera nýggjan brunaveg samsvarandi teimum brunakrøvum, ið Fuglafjarðar kommuna hevur sett, umframt prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

Løgtingið samtykti í apríl 2022 verklagslóg, sum heimilaði táverandi landsstýrismanni at brúka 71 mió. kr. til verkætlanina at um- og útbyggja miðnámsskúlan á Kambsdali.

Verkætlanin hevur verið í útboði á heysti í 2022, og er samlaði kostnaðurin nú mettur til 94 mió. kr.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður grundgivið fyri økta kostnaðinum. Sagt verður, at talan er um hægri byggikostnaðir enn mett, umframt at aðrir óbeinleiðis kostnaðir eru hækkaðir, m.a. orsakað av óvissuni á marknaðinum í dag, sum hevur elvt til munandi prísvøkstur.

Frá 2018 til 2022 eru brúktar 7,8 mió. kr. til fyrireiking og prosjektering, og harumframt eru 8,3 mió. kr. fluttar fram til fíggjarárið 2023.

Nevndin er kunnað um, at Landsverk arbeiðir við at fyrireika avtalu við arbeiðstakaran, sum átti lægsta tilboðið. Sambært útboðstíðarætlanini frá útboðnum í november 2022 skuldi farið verið í gongd við bygging í januar 2023, og av tí, at arbeiðstakarin ikki slapp í gongd við arbeiðið til ásettu tíð, má tíðarætlanin fyri verkætlanina dagførast í samráð við arbeiðstakaran.

Í sambandi við nevndarviðgerðina av uppskoti til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2023 (lm. 47/2022) valdi nevndin tí at lækka uppskotnu játtanina fyri í ár úr 12,2 mió. kr. niður í 10,1 mió. kr., soleiðis at tøka játtanin í ár íroknað framflytingina frá í fjør á 8,3 mió. kr. verður 18,4 mió. kr.

Sambært uppskotinum skulu í 2024 játtast 49,2 mió. kr. og síðani 16,5 mió. kr. í 2025, men við broytingini í fíggjarlógaruppskotinum skulu tær 2,1 mió. kr., ið ikki væntast at verða brúktar í ár, og sum tí heldur ikki verða játtaðar, harumframt játtast í komandi fíggjarári ella í 2025.

Nevndin ásannar, at avbjóðingin kann vera stór at gera neyvar kostnaðarmetingar, áðrenn ein verkætlan er boðin út. Hendan verkætlanin er einki undantak í røðini av byggimálum landsins, har metingarnar hjá Landsverki hava verið ov lágar fyri útboð, og har Løgtingið tí eftir útboð verður biðið um at hækka loyvdu byggiútreiðslurnar í verklagslógini.

Nevndin heitir á landsstýrið um at eftirmeta skipanina fyri byggimál hjá landinum í síni heild, og at finna ein leist fyri byggiverkætlanir frameftir, sum bæði tryggjar tað búskaparliga skynsemið og neyvleikan í teimum upphæddum og innihaldi, ið verða løgd fyri tingið at taka støðu til.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 28. mars 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	